ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 25. september 2009




**Tá risarnir í føroyskum landskappingarfótbólti hjá monnum, HB og KÍ, sunnudagin bresta saman í Gundadali, stendur nógv upp á spæl: HB stríðist fyri meistaraheitinum og KÍ fyri lívinum!**

Mynd: Álvur Haraldsen

# Størsti dystur nakrantíð

**Ongantíð áður hevur ein landskappingardystur í Føroyum havt so nógv standandi upp á spæl hjá báðum liðum og í báðum endum! HB var tó í einari líknandi støðu í 1988, tá meistaraheitið var tryggjað í seinasta umfari ímóti TB, ið samstundis flutti niður**




Hilmar Jan Hansen

Tað er ikki torført at ímynda sær, hvussu tað fer at kóka í Gundadali sunnudagin, tá oddaliðið HB tekur ímóti næstniðasta liðnum, KÍ. Ikki var gamalt, at so langt skuldi vera millum liðini bæði, ið eru tey einastu, ið hava verið partur av bestu mansdeildini í føroyskum fótbólti síðani 1942.

Hetta má metast sum størsti landskappingardystur í Føroyum nakrantíð, tí ein møguleiki er avgjørt til staðar fyri, at søga verður skrivað.

HB var í líknandi støðu í 1988, men ta ferðina í seinasta umfari, tá tað við einum sigri á TB eydnaðist at vinna meistaraheitið, samstundi sum TB fór niður. Forrestin spældi KÍ ta ferðina botndyst ímóti NSÍ og var niðri í eina løtu, tá NSÍ var á odda, men vann so 2-1 og yvirlivdi.

At dysturin hesa ferð er uppaftur størri, hevur fleiri orsøkir. Ein er, at flytur KÍ niður, er bara HB eftir av teimum, ið hava verið við síðani 1942. Og ein onnur er, at hetta eru risarnir í føroyskum landskappingarhøpi gjøgnum allar tíðir – HB við 19 meistaraheitum og KÍ við 17. Her er talan altso um nógvar tungar traditiónir, ið veruliga sleppa at standa sína roynd.

## Maður av húsi

Klaksvíkingar og norðoyingar yvirhøvur eru altíð óførir at fylgja við KÍ, og sunnudagin verður einki undantak og heldur eingin umbering. Teir ídnastu fara óivað fyrst út á Argir at stuðla KÍ-kvinnunum í avgerandi oddabrakinum ímóti AB, áðrenn teir fara í Gundadal, og so er tað sjálvandi ein rúgva, ið bert hevur henda eina dystin fyri eyga.

Umframt nógvu stuðlarnar hjá útiliðnum, er einki at ivast í, at HB-viðhaldsfólk í stórum tali fara at møta upp, umframt at ein rúgva av øðrum fólki verður til staðar, ið bert vil uppliva dystin, ið má roknast sum tann største landskappingardysturin nakrantíð, tí so nógv stendur upp á spæl. HB stríðist fyri meistaraheitinum og KÍ fyri lívinum!

– Spenningurin er stórur her norðuri, og fólk tosa ikki um annað enn henda dystin, tí í eygunum á øllum eru dystirnir millum HB og KÍ tað størsta. So her er einki at ivast í, at maður fer av húsi til Havnar at hyggja og stuðla, tí hesin dysturin hevur so nógv at siga. Vinna vit, eru vit framvegis við í spælinum, og vinnur HB, so er føroyameistaraheitið har, sigur Tummas Lervig, formaður í KÍ.

## Minnir um 2006

Eisini er HB-venjarin, Sámal Erik Hentze, øgiliga spentur til dystin, ið kann verða sera avgerandi fyri, um HB verður meistari ella ikki, umframt at lagnan hjá KÍ í bestu deildini eisini er ein avgerandi faktorur í dystinum.

– Vit fara at gera alt fyri at fáa avgjørt kappingina til okkara fyrimun, tí eg eri vísur í, at hesin dysturin fer at verða spældur við einum fantastiskum karmi rundanum, umframt at vit spæla framman fyri okkara egnu. Fyri okkara viðkomandi vildi tað verið býtt at tikið kjansin og goymt nakað sum helst til seinasta dystin, sigur hann.

Kanska hevur júst HB-venjarin nógvar tankar í høvdinum undan dystinum sunnudagin, tí Sámal Erik var jú hjálparvenjari hjá EB/Streymi í 2006, tá alt var gjørt klárt til tað stóra súsið norðuri á Eiði. Men í staðin tapti EB/Streymur fyri júst KÍ, samstundis sum HB við sigri á ÍF í yvirtíðini streyk avstað við meistaraheitinum í evstu løtu.

## Væl mannaðir

Líkt er eisini til, at bæði lið verða væl mannað til stórdystin sunnudagin. HB má vera Kára Nielsen fyriuttan, tí hann hevur karantenu, men annars er Hanus Thorleifsson komin aftur, eftir at hann hevur verið burturi í útbúgvingarørindum í nakrar vikur, umframt at Rasmus Nolsøe, sum hevur verið burturi síðstu dystirnar, er tøkur hesa ferð.

Somuleiðis hevur KÍ mestsum alt sítt fólk tøkt til dystin, nú Høgni Madsen er klárur aftur eftir karantenu síðstu tríggjar dystirnar. Todi Jónsson, ið ikki hevur verið við í síðstuni vegna skaða, er framvegis ivasamur, og heldur ikki er Jógvan Isaksen komin fyri seg aftur, eftir at hann hevur havt lungnabruna.